


# Raska í pinku-bók

Við orðum og tekningum kunnu føroysk børn nú uppliva stuttligar søgur um Rosku, ið tey flestu munnu kenna frá yrkingunum á mjólkarpakkunum. Í vikuni gevur MBM nevniliga út pinkubók til tey smáu um kúnna og vinir hennara.

Raska loysir hugflogið úr øllum bondum, og søgan verður søgd við nútíðarligum máliskum og yður í orðum, ið kveikja málið hjá børnunum á nýggjan hátt. Raska tekur støði í føroyska gerandisdegnum og stim- brar børnini við at fortelja um teirra egna heim. Ikki umsettan og tilgjørdan, men soleiðis, sum tey sjálv kenna hann – tó at hann er væl kryddaður við undarligum hugskotum og stuttligum vinklum. Júst so, sum børn eru von at síggja verðina.

– Við Rosku vilja vit geva børnum og vaksnum stuttligar søgur og málsligar avbjóðingar aftur við mjólkini. Vit kenna hana longu frá mjólkarpakkunum, og nú kunnu vit so njóta enn fleiri løtur saman við henni í bóku- num,« sigur Kim Petersen, marknaðarleiðari hjá MBM.

Ætlanin er at geva fleiri bøkur um Rosku út. Henda fyrsta bókin eitur Hoppa galoppa og fæst í flestøllum matvøruhandlum.

Sjúrður Gullbein og Ann-Mari Egholm hava skrivað og teknað søguna um Rosku, og konseptment og framleitt fyri MBM hevur Sendistovan.

# Føroyanevndin verður umskipað

**POLITIKKUR** Føroyanevndin hjá Fólkatinginum, sum kemur á vitjan í Føroyum í august, skal umskipast, so 29 fastir limir verða í nevndini

Eirikur Lindenskov

Nú, stutt fyri, at Fólkatingið fer í summarfrí, er avgerð tikin um at umskipa Føroyanevndina hjá Fólkatinginum.

Føroyanevndin viðgerð øll mál, sum koma til Fólkatingið og hava við Føroyar at gera. Edmund Joensen, fólkatingsmaður fyri Sambandsflokkin, er formaður í nevndini.

Higartil hevur Føroyanevndin – eins og aðrar nevndir – verið mannað við 17 føstum limum og 12 eykalimum. Frameftir verður hetta broytt soleiðis, at 29 fólkatingslimir hava sæti í nevndini. Harumframt verður skipanin við eykalimum slept.

– Broytingin ber í sær, at tað verður ruddiligari og smidligari at arbeiða. Tað skapar eyka umsitingarligt arbeiði at hava eykalimir, ið skulu kallast inn, tá fastir limir hava forfall, sigur Edmund Joensen, nevndarformaður.

Umskipanin av Føroyanevndini er partur av generellari broyting, sum Fólkatingið ger í øllum sínum stóru nevndum, teimum sonevndu »standandi nevndunum« (stående udvalg).

Broytingin kemur í gildi, tá Fólkatingið kemur saman eftir komandi val.

Føroyanevndin kemur á vitjan í Føroyum í august í ár. Limirnir í nevndini skulu hava eitt ávíst innlit í føroysk viðurskifti, og tí vitjar nevndin í Føroyum annað hvørt ár.

– Føroyanevndin er aktiv, og limirnir eru sum heild fegnir um at fáa møguleika at vitja í Føroyum. Her fáa tey fyrstu handar upplýsingar og upplivingar, og her knýtast sambond, sum koma væl við í politiska arbeiðinum, sigur Edmund Joensen, formaður í Føroyanevndini.

# Bumbuhóttan rakar føroyska sendistovu

## Í morgun varð ein bumbuhóttan í bygninginum við síðuna av føroysku sendistovuni í Bruxelles

Finnur Jensen

Danska ES-umboðanin mátti í morgun fara úr skrivstovunum í Bruxelles eftir at tey høvdu fingið eina bumbuhóttan. Tað upplýsir Ritzau. Sambært danska ekstrablaðnum var talan um falskan alarm. Men bumbuhóttanin hevur eisini ávirkað føroysku sendistovuna í Bruxelles, sum heldur til í bygningi nummar 71, sum liggur beint við síðuna av bygningi nummar 69 í Rue d´Arlon. Føroysku starvsfólkini, sum eftir ætlan skuldu møta klokkan hálvgum tíggju lokala tíð, fingu smsboð um, at bygningurin varð stongdur vegna bumbuhóttan.

Men sum skilst skuldi alt lata uppaftur sum vanligt nú á døgurða.

*finnur@sosialurin.fo*

# Nordjobb leingir umsóknarfreistina

Nordjobb, verkætlanin, ið samskipar summarstørv fyri ung í Norðurlondum, leingir í ár umsóknarfreistina til 30. juni. Orsøki er, at tað eru óvanliga nógv pláss eftir, ið ikki eru sett, og fleiri av teimum verða heldur ikki sett fyrr enn komið er longur fram á summarið.

Hetta inniber, at ung millum 18 og 28 ár, sum leita eftir summarstarvi, hava ein mánaða eyka til at skriva sína umsókn. Sum "nordjobbari" er møguleiki at fáa starv innan ymsar vinnuvegir, tildømis á eldraheimi í Stockholm, á hotelli í norsku fjøllunum, á einum garði í Íslandi ella á einum flakavirki í Skagen.

Nordjobb hevur altíð havt ilt við at fingið umsøkjarar úr Føroyum, hóast tølini eru batnað hesi seinastu tvey árini. Framvegis er talið av føroyskum umsøkjarin tó bert ein brotpartur at samlaða talinum. Hetta gevur teimum fáu føroyingunum, ið søkja, ein góðan møgulgika at fáa tilboð um starv.

Møguleikarnir fyri starvi eru sum vera mann, tengdir av royndum á arbeiðsmarknaðinum, men fyri tann, ið ikki er kræsin er møguleiki at finna fleiri spennandi størv á heimasíðuni hjá Nordjobb.

Umframt at finna fram størv, syrgir Nordjobb eisini fyri bústaði og skipar fyri eini frítíðarskrá, har møguleiki er at hitta ungdóm frá øllum Norðurlondum. Nordjobb-verkætlanin er rikin av Föreningarna Nordens Förbund og fíggjað av norðurlendska ráðharraráðnum. At søkja Nordjobb er ókeypis. Umsøknin verður send beinleiðis á www.nordjobb.net.

# 35 ár í somu tænastu

Í sambandi við gudstænastuna í Leirvík næstseinasta sunnudag, handaði Anne Mette Klemensen, prestur, Marius Jacobsen ein málning frá kirkjuráðnum, nú 35 ár eru liðin síðani hann byrjaði sum deknur í Leirvíkar kirkju.

35 ár sum deknur er long tíð. Marius man hava lisið hundraðtals lestrar og verið við til hundraðtals kirkjuligar handlingar øll hesi 35 árini. Vit eru mong, ið eru takksom fyri hetta og hava fingið nógv gott burtur úr lestrunum, ið Marius hevur lisið, við síni kláru og mergjaðu rødd.

Umframt barnadóp, var eisini altargangur har eisini konfirmantarnir vóru til altars.



# Nýggir býbussar

Tíggju nýggir býbussar til koyring í Tórshavnar kommunu komu í land av Norrønu í morgun.

Í komandi viku koma fýra bussar afturat. Teir fjúrtan bussarnir skulu eftir ætlan byrja at koyra eftir nýggju ferðaætlanini, sum kemur í gildi 1. juli.

Bussarnir eru av merkinum SOR og eru framleiddir í Kekkia við Iveco motori og teknikki. Bussarnir hava hægstu umhvørvisgóðkenning og eru styttri enn teir verandi býbussarnir og harvið smidligari til býkoyring. Fyritøkan Metek á Hjalla kemur at hava service og eftirlit við bussunum.

Tað eru Gundurs Bussar saman við HZ-Bussum og Jón Thomasen, sum síðan 1. apríl hava rikið Bussleiðina í Tórshavnar Kommunu.

*mg*